


*Nr. 3* *2. februar 2020* *80. árg.*

# Guds eldur

„Er hetta eitt ljós?“ spurdi talarin Egil Svartdahl og setti eitt hvítt, breitt stearinljós á talarastólin.

Hann kom sjálvur við svarinum, meðan hann tendraði ljósið: „Nú er tað eitt ljós! Tað er bara stearin og veikur, til vit festa í tað. Tá verður tað til eitt ljós. Eldurin, sum brennur, er hin stóri munurin. Ein lítil neisti ella logi ger allan munin. „Sí, hvussu lítil neisti kann seta eld á ein stóran skóg.“ Ják. 3,5.

Gud er eldsins Gud. Hann opinberar seg gjøgnum eld. Stundum til dóms, tí Bíblian sigur, at Gud er dómsins Gud, ein oyðandi eldur, sum eisini kann vera ein brennandi vreiði.

Men eldurin er ikki bara ein mynd upp á dóm. Eldurin er eisini ein mynd upp á nærveru Guds. Gud opinberaði seg sum ein skýstólpa um dagin og ein eldstólpa um náttina, tá ið Israels fólk fóru út úr Egyptalandi, so sum vit lesa tað í 2. Mós. 13,21.

Tá ið Gud sendi Jesus Kristus í heimin, tendraði hann ein móteld móti øllum vánaligum og oyðandi í hesi verð. Hann kom fullur av kærleika, góðsku og miskunnsemi. Jesus brendi av Guds kærleika til øll menniskju. Eldhugi var í rødd hansara og ein brennandi eldur í hjartanum. Jóhannes doyparin segði: „Eg doypi tykkum við vatni; men tann kemur, sum er mætari enn eg (nevniliga Jesus), og eg eri ikki verdur at loysa tveingir hansara; hann skal doypa tykkum við heilagum anda og eldi.“ Luk. 3,16.

Heilagi Andin kom við eldtungum hin fyrsta hvítusunnudagin. Men Heilagi Andin er meira enn eldur. Hann umfatar heilagleika, kraft, lívspístr og endurnýggjan. Hann er hugtakandi, men eisini ræðandi.

Vit kunnu ikki vera líkasæl um Heilaga Andan. Guds eldur skal ikki sløkkjast, men vera ein móteldur, sum altíð brennur í hesi verð. Eg biði um, at tann eldurin, sum er í tær, ongantíð má slokna. Birt aftur upp at loga tann logan, sum Gud einaferð tendraði í tær. Mangar eldsálir eru tíverri útbrendar. Av og á kanst tú fara so vítt, at tú verður útslitin. Tað eru tey, sum áður vóru gløðandi og brennandi, sum at enda verða útbrend. Tí er javnvág millum hvíld og arbeiði og millum at taka ímóti og at geva frá sær av alstórum týdningi.

Vit lesa um Elia profet, at tá ið hann hevði gjørt av við allar profetarnar hjá Báali (450) og Ásjeru (400) (1. Kong.18,19), legði hann seg undir ein gývilrunn (19,5). Gud bað Elia fara út og standa á fjallinum, meðan Harrin fór framvið, men Gud var ikki í harðveðrinum, heldur ikki í landskjálvtanum ella eldinum, sum kom aftaná. Eftir eldin kom eitt lítið blídligt fleyr. Straks Elia hoyrdi tað, fór hann út og tók støðu í hellismunnanum.

Gud vil møta tær í kvirruni. Hann er kærleikans eldur. Paulus áminnir okkum: „Verið ikki linir í áhuga tykkara; verið brennandi í andanum; tænið Harranum.“ Róm. 12,11.

Lat teg ikki ræða. Lat ongan taka longsulin frá tær at liva sterkt við Gudi. Men kraft, kærleiki og vísdómur gevur tær ta røttu javnvágina at bera Guds eld,“ endaði Egil Svartdahl.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vit vilja jú liva...

Menniskju satsa ótrúliga nógv upp á hetta at halda uppi og leingja um lívið. Skurðfrøðin ger inntriv, sum bara fyri fáum árum síðani vóru óhugsandi. Sjúklingar standa í bíðirøð, eisini tá ið úrslitið er óvist.

Hitt almenna rindar ómetaligar pengaupphæddir til at stríðast ímóti ymsum sjúkum. Granskarar arbeiða ídnir við nýggjum heilivágum, og hjálparfelagsskapir royna sítt ítasta. Tað ræður jú um lívið.

Tó, lívið stendur ikki til at bjarga. Tað er ein sannroynd. Vit hava øll mist onkran. Kroppurin er úr forgeingiligum tilfari. Allur heilivágur og allar viðgerðir hava at enda onga ávirkan. Men tá – tá ið alt okkara egna hevur spælt fallit, er

tað ein lækni, sum ikki bara kann leingja um lívið, men sum kann geva okkum ÆVIGT LÍV!

Hví hava vit tá ikki størri áhuga í honum nógv MEIRA og nógv FYRR? Tað er óklókt at bíða við at fara til Læknan yvir øllum læknum, tá ið tú veitst, at einki annað kortini at enda nyttar?

„Ikki er heldur nakað annað navn undir himlinum, givið millum manna, sum vit skulu verða frelstir við.“ Áps. 4,12.

*Effie Campbell* umsetti.

Vit liva í einari tíð, har tað er møguligt at síggja Jesus koma aftur eftir sínum. Ongantíð hevur tað verið møguligt at vinna verðina á ein slíkan hátt og so skjótt sum í okkara tøknifrøðiligu tíð. Tíðin er nú, og hon er okkara. Vit eru sendiboð Harrans, og uppgávan er okkara.

*e.c.* ums.

# Grøvin hjá einum spottara

Hetta er frásøgnin um gudloysingin og gudsavnoktaran Chester Bedell. Bedell doyði 82 ára gamal. Tað var í 1908. Alt lív sítt hevði hann brúkt at háða og spotta kristindómin. Longu meðan hann livdi, gjørdi hann ein stóran stabbastein, sum skuldi standa á framtíðar gravstaði hansara.

Upp á henda stabbastein fekk hann stoypt eina stóra standmynd úr bronsu, sum skuldi ímynda hann sjálvan. Undir øðrum fótinum lá ein bók, sum skuldi ímynda Bíbliuna. Hann stóð tískil og traðkaði á Bíbliuna. Í eina plátu, sum var fest til høgru útrættu hond hansara, stóð grivið: „Bíblian er bara fáplar, ævintýr og samanpentaðar skrøggsøgur.“

Áðrenn hann doyði, segði hann hesi orð: „Um nakar Gud er til, lat hann so prógva tað á henda hátt: Tað skal yðja av slangum á grøv míni, tá ið eg doyggi!“

Hetta er so tað, sum hendi: Áðrenn kistan varð sett niður í jørðina, vóru slangur longu at síggja! Tá ið tann norski presturin Thorleif Myckland var á grøvini í 1946, kundi gravarin siga honum, at hann hevði dripið út ímóti 20 slangur ein dag og allar bara á hesari grøvini! Øll sóu harumframt sjálv eina rúgvu av slanguholum við standmyndina av Bedell, og øll holini gingu niðureftir.

Myckland tosaði eisini við aðrar, sum arbeiddu á kirkjugarðinum. Teir søgdu, at grøvin hjá Chester Bedell skuldi flytast, av tí at fólk argaðust inn á hana. Millum annað komu nógv fremmandafólk ymsa staðni frá at hyggja at fyribrigdinum og taka myndir. Nú er sjálv grøvin flutt eitt lítið petti út um gravstaðið, og eitt sedristræ er sett niður har við síðuna av. Seinni er boðað frá, at her hava teir eisini sæð nógv slanguhol. Tað er sostatt skilligt, at slangurnar elta grøvina hjá gudloysinginum. Eitt lítið petti frá grøvini hava menn kannað lendið ógvuliga gjølla; men her er eingin farvegur eftir slangum!

*Úr norskum - Effie Campbell* umsetti.

# TIL TROYST OG UGGANAR

*Hesi versini fekk eg frá einari vinkonu í Noregi.*
*Tey gjørdu mær so gott, og tí vil eg fegin geva tey víðari:*

*Der finnes ei tårer i himlen,*
*der aldrig jeg gråte skal mer.*
*De tårer, som rant her på jorden,*
*som perler i himlen jeg ser.*

*Der borte fra jordens skygge,*
*fra alt, som tynget mig ned,*
*der hviler mit sårede hjerte,*
*der har jeg evig fred.*

*Der skal jeg synge i koret*
*og takke min Skaper god,*
*som i min jordiske trængsel*
*fast ved min side stod.*

---

Um Gud kundi læsa gapið á leyvunum fyri Dánjal, kloyva Reyða Havið fyri Móses, lata sólina standa í sama stað fyri Jósva, lata fongslið upp fyri Pætur, leggja ein nýføðing í armarnar á Sáru og reisa Lázarus upp frá teimum deyðu, so kann Hann vissuliga taka sær av tær. Trúgv á Hann, set títt álit á Hann.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2. feb. | Tekstur: | 4 Mós. 21,4-9 og Jóh. 3,16-17 | bíbliuorð: | Jóh. 13,15 |
| 9. feb. | Tekstur: | 5 Mós. 26,1-11 | bíbliuorð: | 5 Mós. 26,11a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 4* *16. februar 2020* *80. árg.*

# Alt broytist við bøn

„Land land land – hoyr orð Harrans“ stendur skrivað við stórum bókstøvum á vegginum á Mjøndal Bedehus. Eg koyri fram við bønhúsinum hvønn dag, og hvønn dag verði eg mintur á at biðja. Virksemi er ikki so stórt í hesum bønhúsi, men veggurin vitnar um tað týdningarmesta, landi okkara tørvar.

Hetta summarið havi eg koyrt fram við mongum stongdum bønhúsum. Summi eru bygd um til smáttur, onnur til ymisk verkstøð, meðan onnur bønhús eru vorðin til moskur og hindutempul, har fremmandir gudar verða tilbidnir. Tá ið eg koyri kring landið og síggi allar tær hvítmálaðu kirkjurnar, hugsi eg um Jesu orð: „Hús mítt skal nevnast eitt bønhús; men tit gera tað til eitt ránsmannabøli.“ Matt. 21,13.

Í mongum kirkjum og bønhúsum er lítið virksemi, men tey vitna um eina tíð, tá ið norðmenn bóðu og søktu Gud. Tá ið eitt fólk gevst at biðja til Guds, vitnar tað um, at vit ikki hava brúk fyri Gudi, men megna lívið sjálv uttan Gud. Men fyri okkum, sum virka úti í Guds víngarði og trúgva, at einki er Gudi ógjørligt, har er forbønnin og bønin sjálv lívsæðrin.

Tað er forbønin, sum ger, at Heilagi Andin virkar. John Wesley, sum stovnaði metodistkirkjuna, segði: „Mær tykir, at Gud ger einki í einum landi, uttan at onkur er, sum biður.“ Og tað er so satt, so satt! Guds orð eggjar okkum fram um alt at biðja. Í 1. Tim. 2,1-2 stendur, at vit skulu biðja fyri øllum, sum eru sett í høg størv. Hetta er tí, at bønir ávirka eina tjóð, og Gud vil, at øll skulu blíva frelst. Halt á at biðja: komi ríki títt, verði vilji tín sum í himli so á jørð. Matt. 6,10.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvør var sjúkan?

Í einum av andaktum sínum greiddi Asbjørn Kvalbein frá einum manni, sum fór til læknan. Maðurin segði, at hann kendi seg ógvuligan sjúkan, men hann dugdi ikki nærri at greiða frá hesum. Læknin kannaði hann gjølla og kundi so bera honum tey gleðiboðini, at hann var púra frískur.

Maðurin fór avstað, men nakrar dagar seinni kom hann aftur og segði, at tað var reint galið, hann hevði ongan matarlyst, hann fekk ikki sovið, og hann kendi seg av sonnum ógvuliga sjúkan.

Aftur sendi læknin hann til kanningar, og hann fekk tikið ymsar blóðroyndir, men tað segði tað sama, maðurin var púra frískur. Læknin segði hetta við hann. Seigliga vendi maðurin sær á, men áðrenn hann fór út gjøgnum dyrnar, slerdi ein tanki niður í læknan. „Likamliga bagir tær einki," segði læknin, „men sig mær eitt, hevur tú gjørt okkurt skeivt, sum tú nú angrar so nógv, at tú kennir teg sjúkan?"

Maðurin gjørdist firtin og fór í sinni avstað. Men tað gingu bara nakrir fáir dagar, so var hann aftur. „Læknin," segði hann, „tú setti fingurin á tað eyma staðið og kollgitti. Eg havi gjørt nakað skeivt móti beiggja mínum. Eg skuldi ansað eftir fyritøku hansara, meðan hann er staddur uttanlands. Eg havi tikið pengar frá honum, og tað er gjørt so snildisliga, at eingin fer at uppdaga, at tað eri eg, sum havi gjørt tað, og nú eri eg so ræðuliga sjúkur av hesum. Hvat skal eg gera?"

„Eg skal siga tær, hvat ið tú skalt gera. Tú skalt skriva eitt bræv til beiggja tín og siga honum alt. Síðani skalt tú leggja ein kekk inn í sama brævbjálvan, har tú rindar fyrsta avgjaldið av skuldini til beiggja tín."

Tað gjørdi maðurin, og læknin fylgdi honum til postkassan fyri at vera vísur í, at hann sendi brævið. Tá ið maðurin vendi sær á eftir at hava koyrt brævið í postkassan, strálaði hann av gleði og segði: „Nú kenni eg meg so púra frískan!"

Hatta er tað. Skriftin sigur: „Um vit ganga í ljósinum, eins og hann er sjálvur í ljósinum, tá hava vit samfelag hvør við annan, og blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd." (1. Jóh. 1,7). „Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar

og reinsar okkum frá allari órættvísi.“ (1. Jóh. 1,9). Syndin skal altso játtast, hon skal fram í ljósið, tá kemur samfelagið aftur í rætt lag við onnur menniskju, og Jesu blóð reinsar okkum frá allari synd, vit verða fullkomiliga rein.

*Effie Campbell.*

# Tey niðurundirkomnu

Summarstevnan hjá „Norge i dag“ varð víst á Visjon Norge. Ein av talarunum var hin kendi evangelisturin Steinar Harila úr Kristiansand, sum eisini hevur fingið kongsins heiðursmerki í silvuri fyri at hava gjørt hjálpararbeiði í Russlandi í mong ár. Hann hevur eitt felag, sum kallast „Hjelp til Russland“. Hann savnar pengar inn til hjálpararbeiðið m.a. við at hava endurnýtsluhandlar. Stórur tørvur er á mati og heitum klæðum millum tey niðurundirkomnu í Russlandi. Hann greiðir soleiðis frá:

Vit høvdu latið pengar til at seta eina sosiala miðstøð á stovn. Eg fekk eina innbjóðing sendandi, tá ið miðstøðin skuldi vígast. Í brævbjálvanum lá eisini skráin fyri hátíðarhaldið. Har stóð, hvør ið skuldi tala og tey ymisku innsløgini, og niðast stóð: „Vit skála í Vodka“.

Eg setti meg niður at skriva eitt svar, sum ljóðaði nøkulunda so: „Eg veit væl, at í Russlandi er tað mentan at skála í vodka, men tað er ikki mín mentan. Eg haldi, at tað er av tí ónda, ja, beint sagt frá djevlinum, tí tá ið eg síggi børn vála einsamøll um í gøtunum í Leningrad, veit eg, at orsøkin er, at heima skála tey í vodka, og tað gongur so vilt fyri seg, at børnini rýma út á gøtuna. Tá ið eg síggi eina sorgarbundna, barda og sligna konu úti á gøtuni, veit eg, at orsøkin er, at maðurin hevur bart hana av í einum vodkarúsi. Tí vil eg ikki vera uppií at skála í vodka.“

So sendi eg brævið og hugsaði, at eg fór ongantíð at fáa nakra innbjóðing aftur. Nakrar dagar seinni fekk eg aftursvar. Brævið ljóðaði so: „Vit hava ongantíð fingið eitt sovorðið bræv sum títt. Men tað er púra satt, tað, sum tú skrivar. Vit hava gjørt av, at tað skal ikki skálast í vodka, og tú ert vælkomin.“

Tað loysir seg at standa stinnur á tí, sum tú heldur vera rætt, sjálvt um tú ert einsamallur í parti. Hini fáa virðing fyri tær, tá ið tú grundgevur fyri tínari meining. Tað eru bara teir deyðu

„fiskarnir“, sum reka við streyminum. Teir livandi stríða seg ímóti streyminum upp um fossarnar.

*Effie Campbell.*

# Templið hjá jødunum

Ein bíbliulærari tosaði við ein trúgvandi mann. Prátið datt niður á templið hjá jødunum. „Tað verður einki tempul bygt,“ segði hin trúgvandi, „tí Jesus býr í hjørtunum á teimum, sum trúgva (Ef. 3,17), og skrivað stendur, at nú eru tað likam teirra, sum er tempul Heilaga Andans.“ (1. Kor. 6,19).

„Íðan,“ svaraði bíbliulærarin, „templið skal ikki byggjast til Jesus. Tað skal byggjast til Antikrist, tí har fer hann at seta seg niður og siga seg sjálvan vera Gud. Tá fara jødarnir at vakna og bróta sáttmálan við hann, tí teir síggja, at teir hava gjørt sáttmála við sjálvan Antikrist. Skriftin sigur okkum hetta í 2. Tess. 2,3-4: „Latið ongan villa tykkum á nakran hátt; tí at fyrst má jú fráfallið koma, og syndarinnar maðurin (Antikrist) verða opinberaður, glatunnar sonurin, hann sum setir seg ímót og hevjar seg upp yvir alt, sum kallast Gud ella halgidómur, so at hann setir seg í Guds tempul og sigur seg sjálvan vera Gud.“

Tá ið friðarsamráðingarnar vóru millum Bill Clinton, Arafat og Netanyahu, segði Arafat, at tað hevði ongantíð verið nakað tempul á tempulfjallinum. Tá reistist Netanyahu og fór yvir til bókahillina, tók eina bók haðani og segði: „Tað hava verið tvey tempul her: Sálomons tempul og Heródesar tempul.“ Tá varð Arafat teptur, tí hansara lygnir vórðu avdúkaðar.

*Effie Campbell.*

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 16. feb. | Tekstur: | 4 Mós. 27,18 + 22-23 og Jós,1,1-9 | bíbliuorð: Jós. 1,5b |
| 23. feb. | Tekstur: | Matt. 6,17-18 og 1 Sám. 16,4-13 | bíbliuorð: 1 Sám. 16,7c |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74